# Tryggur útflutningur av talentum

**Tryggingarfelagið Føroyar, sum hevur verið millum stuðlarnar øll árini, North Atlantic Football Agency hevur »útflutt« føroyskar spælarar, hevur longt stuðulssáttmálan við spælaraumboðsmann in, Jákup í Stórustovu**



*Brynhild Setberg frá Tryggingarfelagnum Føroyar og Jákup í Stórustovu frá North Atlantic Football Agency skriva undir sáttmála millum feløgini*

Tey mongu seinnu árini eru alsamt fleiri føroyskir fótbóltsspælarar slopnir at royna seg uttan fyri landoddarnar. Summum eydnaðist at vinna sær sáttmála og øðrum untist at fáa ta stóru uppliving, ein venjingarferð til okkurt av stórfeløgunum í Europa altíð vil vera.

Maðurin aftan fyri hesa serligu útflutningsvinnu er Jákup í Stórustovu, sum í mong ár hevur rikið sína egnu fyritøku, North Atlantic Football Agency, hvørs endamál er at útvega evnaríkum føroyskum spælarum bestu møguleikar uttanlands.

Slíkt virksemi gerst ikki uttan kostnað, so tí hevur North Atlantic Football Agency sínar stuðlar, ið á henda hátt beinleiðis eru við til at lyfta bestu føroysku talentini upp á ovastu rók fótbóltsliga.

Ein av fleiri stuðlum, ið hava fylgt Jákupi í Stórustovu øll hesi árini sum spælaraumboðsmaður, er Tryggingarfelagið Føroyar. Samstarvið hava báðir partar verið væl nøgdir við, tí nú um dagarnar varð sáttmálin teirra millum enn eina ferð longur.

## Slóðbrótandi

– Tað er eitt sera áhugavert arbeiði, Jákup í Stórustovu ger sum spælaraumboðsmaður, og í longdini hava hansara drúgvu royndir nógv at siga fyri ungar fótbóltsspælarar, ið nú kunnu fáa møguleikan til meira enn at droyma um eina fótbóltstilveru uttanlands.

Tað sigur forstjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar, Gunnar í Liða, ið heldur virksemið hjá North Atlantic Football Agency vera týdningarmikið fyri góða umrøðu, sum Føroyar kunnu fáa uttanlands.

– Eg trúgvi eisini, at hetta kann hjálpa nógvum av hesum ungu at síggja, at tað ikki nýtist at vera ógjørligt at sleppa at royna seg sum yrkisspælarar. Hetta er jú ikki so langt burturi longur, sigur tryggingarstjórin.

– Virksemið hjá Jákupi í Stórustovu er av nokk so slóðbrótandi slagi, og av tí at vit síggja hetta sum nakað, sum er rættiliga umboðandi fyri Føroyar úteftir, vilja vit fegin halda fram við stuðulssamstarvinum.

orstjórin í Tryggingarfelagnum Føroyar undirstrikar eisini, at í samstarvinum ber bæði til at vera við til at hjálpa ungdómi av landinum at royna seg, men eisini at gera tryggingarfelagið meira sjónskt gjøgnum virksemið hjá North Atlantic Football Agency.

## Uppliva dreymin

Jákup í Stórustovu fegnast um, at Tryggingarfelagið Føroyar framvegis hevur hug at stuðla virkseminum hjá North Atlantic Football Agency, tí tað krevur ikki so lítið at skapa ungum fótbóltsspælarum møguleikar uttanlands.

– Arbeiðið er sjálvandi við árunum blivið eitt sindur øðrvísi, enn tað var í fyrstuni. Mínar royndir eru størri enn tær vóru, men eisini er nógv hent hesi árini, ið ávirkar eitt nú arbeiðsgongdirnar, greiðir Jákup í Stórustovu frá.

– Tey fyrstu árini fór mesta tíðin við at gera vart við føroyskan fótbólt uttanlands, men nú er tað ikki so óvanligt, at feløgini sjálvi spyrja seg fyri. Tað gevur nakrar aðrar og kanska uppaftur meira spennandi møguleikar.

Í løtuni hevur North Atlantic Football Agency tilsamans 10 spælarar uttanlands, men harumframt eru 12 spælarar her heima, sum arbeitt verður við í løtuni, so teir kunnu sleppa uttanlands at royna seg.

– Tað kann taka frá einum mánaði til hálvtannað ár, áðrenn nakað ítøkiligt spyrst burturúr, so tí fegnist eg um, at Tryggingarfelagið Føroyar framvegis telist millum trúgvu stuðlarnar, ið tryggja hesum ungu spælarunum møguleikan at uppliva dreymin um eina fótbóltstilveru uttanlands, sigur Jákup í Stórustovu.

Atgongumerki kunnu bíleggjast á tel 21 68 70

